## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og regn av og á. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi, leygardagin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

# Tey ala dunnur í Mykinesi



*Mykinesmenn eru farnir undir at ala dunnur*
*Mynd: Bárður Eklund Johansen*

**Í Mykinesi eru menn farnir at ala dunnur. Eini fimmhundrað dunnur ganga higartil og bíða eftir at vera dripnar**

ALTERNATIV VINNA
*Heri á Rógvi*

Tað eru ikki nógv arbeiðspláss úti í Mykinesi. Okkurt hendinga arbeiðspláss er, men tað er fyri tað nógva eitt nú samferðslu arbeiði.

Tað er tó onkur, sum hevur valt at royna nýggjar leiðir. Esbern í Eyðansstovu hevur saman við Oskar Joensen tikið stig til at ala dunnur úti í Mykinesi.

Tá Sosialurin vitjaði fyri kortum, so var tað ikki júst dunnur í hópatali, ið vit høvdu væntað at sæð har. Dunnurnar eru fingnar av Morskranesi og talan er um danskar dunnur. Henda sama alingin er eisini roynd aðrastaðni, og við góðum úrslitið, eftir hvat vit skilja á lagnum.

Talan er í roynd og veru um at royna at skapa nýggjar inntøku- og vinnumøguleikar. Hvussu fer at gangast við hesum góðu dunnum er ilt at spáa um. Tað kann hugsast, at mangur føroyingar, sum lesur hesar reglur, kannar sær jóladøgurðan. Tað kann eisini lættliga hugsast, at jóladøgurðin hjá mongum fer at koma úr Mykinesi. Fólk eru eftir øllum at døma ógvuliga áhugaði í at fáa føroyskar dunnur til jóla, og mangar søgur ganga um menn, sum vilja lata nógvan pening fyri, at júst teirra besti biti á jólum skal vera av føroyskum slag.

Enn er ikki so langt fráliðið, síðani dunnurnar komu út í oynna, men tað sigst, at tað gongur væl at hava dunnur í hópatali gangandi úti í Mykinesi.

Hetta er eftir øllum at døma ein roynd at ganga nýggjar leiðir hjá íbúgvunum á vestastu oynni í Føroyum.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 21 |
| Tromsø | 7 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 32 |
| Malorca | 35 |
| Athen | 31 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 32 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1000 hPa. yvir Mið-Skandinavia kemur móti Føroyum, meðan lágtrýstið við Hetland grynnist.




Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður nær Føroyum teir komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/08 kl. 06[00]– 06/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 05/08 kl. 06[00]– 06/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í aug.: 8,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august: Fullmáni
5. august: Mánin longst frá jørðini
12. august: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. aug | 09.52 | 22.10 | 08.52 | 21.10 | 09.07 | 21.25 | 11.52 | — | 00.33 | 12.52 | 08.07 | 20.25 | 07.07 | 19.25 | 10.07 | 22.25 | 11.07 | 23.25 | 09.37 | 21.55 | 10.52 | 23.10 |
| 8. aug | 10.28 | 22.45 | 09.28 | 21.45 | 09.43 | 22.00 | 00.10 | 12.28 | 01.10 | 13.28 | 08.43 | 21.00 | 07.43 | 20.00 | 10.43 | 23.00 | 11.43 | — | 10.13 | 22.30 | 11.28 | 23.45 |
| 9. aug | 11.03 | 23.21 | 10.03 | 22.21 | 10.18 | 22.36 | 00.45 | 13.03 | 01.45 | 14.03 | 09.18 | 21.36 | 08.18 | 20.36 | 11.18 | 23.36 | 00.00 | 12.18 | 10.48 | 23.06 | — | 12.03 |
| 10. aug | 11.39 | 23.57 | 10.39 | 22.57 | 10.54 | 23.12 | 01.21 | 13.39 | 02.21 | 14.39 | 09.54 | 22.12 | 08.54 | 21.12 | 11.54 | — | 00.36 | 12.54 | 11.24 | 23.42 | 00.21 | 12.39 |

Sera bíligt at
LEIGA
SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

BILLUTIR



ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Uppsetan av antennum og parabolum
Ring og hoyr nærri ella støkk inn á gólvið



Søla og tænasta
Verkstaður
Antennu- og parabolmontering
Útleigan
radi e livan .
RADIOHANDILIN
. insensg ta 1 O 100 rsha n
l . 18277 a 18 77

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes